Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Palliatión

Spurningar:

1. Hvussu verður arbeitt við at seta í verk tilmælini um palliatión í Føroyum?
2. Hvussu nógvar pengar hevur heilsuverkið fingið játtaðar í 2021 til palliatión?
3. Væntar landsstýrismaðurin at koma á mál við tilmælunum um palliatión í 2022 sum ætlað?

Viðmerkingar:
Í november 2019 varð eitt álit um palliatión handað landsstýrismanninum í heilsumálum. Álitið kom við tilmælum um, hvussu palliativa økið í Føroyum eigur at skipast. Millum annað var ein tíðarlinja gjørd fyri, nær tilmælini skulu setast í verk. Talan er um eitt trý ára tíðarskeið frá 2020 til og við 2022. Mett verður, at kostnaðurin at seta í verk tiltøkini tilsamans er 29,5 mió. kr. Í 2023 skal ein eftirmeting gerast.

Í fíggjarlógini fyri 2021 stendur, at palliatión er eitt raðfest øki innanfyri heilsuverkið, men kortini verður ikki nágreinað, hvussu nógvar pengar talan er um.

Fyri at fáa greiðu á, hvussu arbeitt verður við at seta í verk tilmælini um palliatión verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 18. mai 2021

Eyðgunn Samuelsen